# Fíggjarligt støðufesti

## Nov. 2024

Í september 2024 var útlánsvøksturin 4,3% hjá føroysku bankunum og 3,5% tá ið danskir fíggjarstovnar verða taldir uppí. ECB hevur lækkað rentuna tríggjar ferðir, og tað fer at lætta um bústaðarbyrðuna hjá føroyskum sethúsaeigarum.

### *Vøksturin í útlánum*

Føroysku bankarnir høvdu útlán til føroyskar kundar fyri 19,3 mia. kr. í september 2024. Í september í fjør vóru útlánini 18,6 mia. kr., og tey eru tí økt við 700 mió. kr. í hesum tíðarskeiði.

Vøksturin í útlánunum hjá føroysku bankunum var 4,3% í september 2024, roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal samanborið við sama tíðarskeið árið fyri. Útlánsvøksturin hjá føroysku bankunum er minkaður síðani árslok 2023, tá hann var 10,2%, sí mynd 1.

*Mynd 1. Útlánsvøksturin øktur í føroysku bankunum*




Kelda: MFI, Landsbanki Føroya.

Vøkstrinum í útlánunum hjá føroysku bankunum stavar frá øktum útlánum til almennar fyritøkur og kommunur. Útlán til privatu vinnuna frá føroyskum bankum eru hinvegin minkaði; útlánsvøksturin til privatu vinnuna var negativur í september 2024 og togar sostatt niður í samlaða útlánsvøkstrinum hjá føroysku bankunum.

Kommunurnar hava millum annað fingið fígging til at byggja havnir og vegir, ímeðan almennu fyritøkurnar hava lænt til millum annað bústaðabygging, flutning og orku. Kommunurnar hava økt um skuldina við 150 mió. kr. í tíðarskeiðinum september 2023 til september 2024, og tær skylda tilsamans 1,7 mia. kr. Burturav hesi upphædd skylda eitt nú Tórshavnar og Klaksvíkar kommuna góðar 400 mió. kr. í part,

Runavíkar kommuna 170 mió. kr. og Fuglafjarðar kommuna 90 mió. kr. (september 2024).

Útlánini eru eisini økt til húsarhaldini frá føroysku bankunum, men tey eru samstundis minkaði frá donsku realkredittstovnunum. Útlánini frá føroyskum bankum til húsarhaldini eru økt við 650 mió. kr. hetta seinasta árið, meðan útlán frá donskum realkredittstovnum til føroyingar eru minkaði við umleið 250 mió. kr. í september 2024 samanborið við september 2023. Í september 2024 vóru útlánini góðar 3,4 mia. kr. frá realkredittstovnunum og 10,8 mia. kr. frá føroysku bankunum.

Útlánsvøksturin hjá donsku realkredittstovnunum var framvegis negativur í september 2024; hann var -6,8%. Útlánsvøksturin hjá donsku realkreditt-stovnunum hevur verið uppaftur meira negativur, men nú er vend komið í.

Vøksturin í útlánum frá donskum realkreditt-stovnum til føroysk húsarhald hevur verið minkandi síðani á sumri 2022, tá ið renturnar byrjaðu at hækka. Hetta kemur helst av, at rentan á langu donsku realkredittlánunum hækkaði beinanvegin í mars 2022, tá ið miðbankin í Evropa á fyrsta sinni tosaði um møguligar rentuhækkingar[1]. Harafturímóti hækkaðu renturnar í føroysku bankunum ikki fyrr rentuhækkingar veruliga vórðu framdar, og hetta kann hava elvt til, at føroysku húsarhaldini valdu føroysku bankarnar framum donsku realkredittstovnarnar, tá biðið varð um bústaðarfígging. Nú, ið renturnar byrja at lækka, fer eftirspurningurin eftir fígging frá donskum realkredittstovnum møguliga at veksa aftur.

Danskir realkredittstovnar læna einamest til bústaðarfígging, meðan danskir peningastovnar í størstan mun veita fígging til privata vinnulívið í Føroyum. Útlán frá donskum peningastovnum til føroyskar kundar eru økt við 300 mió. kr. síðani september 2023 og vóru í september 2024 góðar 700 mió. kr. (ikki víst í mynd 1).

Tilsamans eru útlánini til føroyingar netto økt við 750 mió. kr. frá føroyskum og donskum fíggjarstovnum tilsamans í tíðarskeiðinum september 2023 til september 2024.

Útlánsvøksturin frá føroysku og donsku peninga- og realkredittstovnunum til føroyingar var tilsamans 3,5% í september 2024. Útlánini vóru 23,4 mia. kr. tilsamans í september 2024 frá føroysku og donsku peninga- og realkredittstovnunum tilsamans.

### *Innlánsvøkstur*

Pengar á bók ella innlánsvøksturin í føroysku bankunum var 2,4% í september 2024. Innlánsvøksturin stavar frá vøkstri í innlánum frá húsarhaldum (6,1% roknað sum eitt 3 mánaðar miðaltal) og privatu vinnuni (5,6%). Vøksturin í innlánum frá húsarhaldunum er øktur støðugt síðani á vári 2023 og hjá privatu vinnuni síðani á vári 2024. Samlaðu innlánini í føroysku bankunum vóru 20,3 mia. kr. í september 2024, sum eru góðar 800 mió. kr. hægri, enn í september 2023.

### *Innlánsyvirskot*

Innlánsyvirskotið í føroysku bankunum var 1,4 mia. kr. í september 2024; 1 mia. kr. í Føroyum og 400 mió. kr. í útlondum. Deildin hjá Føroya Banka í Grønlandi er tald við, umframt inn- og útlán hjá føroysku bankunum í útlendskum fíggjarstovnum.

*Mynd 2. Innlánsyvirskot hjá føroysku bankunum*




Kelda: Landsbanki Føroya. Frároknað inn- og útlán til aðrar fíggjarstovnar.

[1] *Monetary policy statements at a glance* – Mars 2022, ecb.europa.eu.

Innlánsyvirskotið minkaði munandi í februar 2021, men tað var tí danska deildin hjá Føroya Banka varð seld frá.

Innlánsyvirskotið hjá húsarhaldunum í føroysku bankunum var 3,1 mia. kr. í september 2024, men verður skuldin, sum húsarhaldini hava í donskum realkredittstovnum tald við, høvdu føroysku húsarhaldini innlánsundirskot á 190 mió. kr. í september 2024.

# Roknskaparúrslit

### *Úrslit hjá føroysku bankunum*

Úrslitið áðrenn skatt hjá bankunum vaks munandi í 2023 samanborið við undanfarin ár orsakað av framgongd í grundrakstrinum.

*Mynd 3. Úrslit áðrenn skatt*

**Úrslit hjá føroysku bankunum, 2016 - 2023**
mió. kr.




Kelda: Finanstilsynet. "Annað" eru vinningsbýti, úrslit av ognarparti í atknýttum virksemi og úrslit av virksemi undir avvikling.

Eisini gav kursjavning eitt positivt ískoyti til úrslitið í 2023, eins og lágu niðurskrivingarnar vóru við til at gera úrslitið í 2023 betri, enn í undanfarnu árunum, sí mynd 3.

*Mynd 4. Rentumarginalurin er øktur*

**Rentumarginalur**
Prosentstig, føroyskir peningastovnar




Kelda: Landsbanki Føroya. Miðal innlánsrenta í føroysku bankunum (innlán frá húsarhaldum og ikki-fíggjarligum fyritøkum) og miðal útlánsrenta í føroysku bankunum (útlán til húsarhald og ikki-fíggjarligar fyritøkur). Húsarhald íroknað NPISH. Rentumarginalurin er munurin millum innláns- og útlánsrentuna.

Vøksturin í grundrakstrinum í 2023 stavar í stóran mun frá øktum nettorentuinntøkum. Netto-rentuinntøkur er munurin millum rentuinntøkur frá útlánum og rentuútreiðslum á innlánum.

Nettorentuinntøkurnar eru øktar seinastu tvey árini, tí føroysku bankarnir hava økt útláns-rentuna meira, enn innlánsrentuna, ið merkir, at rentumarginalurin er øktur, sí mynd 4.

Hinvegin hava inntøkurnar frá ómaksgjøldum verið lægri í 2021 - 2023, enn í undanfarnu árunum, sum eru víst í mynd 5.

*Mynd 5. Grundinntøka*

**Grundinntøka hjá føroysku bankunum, 2016 - 2023**
mió. kr.




Kelda: Finanstilsynet. "Annað" eru aðrar rakstrarinntøkur og -útreiðslur, avskrivingar og avsetingar á materiella og immateriella ogn.

Talva 1 vísir úrslitið hjá føroysku peninga-stovnunum í krónum fyri árið 2023 og fyrra hálvár 2024, umframt solvensin í %.

*Talva 1. Úrslit hjá føroysku bankunum*

**Úrslit hjá føroysku bankunum**

| | 2023 | 2024 1. hálvár | |
|---|---|---|---|
| | Úrslit áðrenn skatt, mió. kr. | Úrslit áðrenn skatt, mió. kr. | Solvensur, % |
| BankNordik | 379,0 | 175,0 | 29,2 |
| BetriBank | 347,0 | 206,0 | 37,0 |
| Norðoya Sparkassi | 48,4 | 30,5 | 28,8 |
| Suðuroya Sparkassi | 7,4 | 3,4 | 24,2 |

Kelda: Roknskapir hjá peningastovnunum

### *Bankarnir hava afturført niðurskrivingar*

Myndi 6 vísir, at niðurskrivingar á útlán hava verið lágar í 2022, 2023 og fyrru helvt av 2024. Niðurskrivingarnar vóru stórar eftir kreppuna í 90'unum og í 2010 eftir fíggjarkreppuna í 2008.

Niðurskrivingarnar vóru hægri í 2020 vegna Covid-19. Covid-19 vísti seg tó ikki at hava eins stórar avleiðingar, sum væntað, og ein partur av avsettu upphæddunum vórðu ikki afturførdar, men settar til síðis sum niðurskrivingar í sambandi við geopolitisku óvissurnar í 2022, tá kríggið í Ukraina brast á.

Í 2022 varð peningur eisini settur til síðis til møguligar komandi niðurskrivingar, skuldi tað hent seg, at inflatiónin og rentuhækkingarnar fóru at elva til fíggjarligar trupulleikar hjá privat- og vinnukundum.

*Mynd 6. Niðurskrivingar á útlánum*




Kelda: Finanstilsynet. 2024 bert fyrsta hálvár.

Í 2023 og fyrru hálvu 2024 hava summir av bankunum tó afturført niðurskrivingar, tí kundarnir kortini ikki hava havt trupulleikar við at halda sínar lánsskyldur mótvegis bankunum, hóast rentan og inflatiónin hevur verið høg.

### *Fá mishildin lán*

Samsvarandi hesum sæst í mynd 7, at parturin av mishildnum lánum hjá privat- og vinnukundum hevur verið sera lágur síðani 2021 samanborið við undanfarnu árunum.

*Mynd 7. Mishildin lán*




Kelda: Finanstilsynet. Privatkundar eru húsarhald uttan npish. Vinnukundar eru almennar og privatar ikki-fíggjarligar fyritøkur. Mishildin lán eru lán sum hava verið í eftirstøðu í meir enn 90 dagar.

Mishildin lán eru lán, sum hava verið í eftirstøðu í meir enn 90 dagar. Sum heild hava mishildnu lánini verið færri hjá húsarhaldunum (privatkundum), enn hjá vinnuni.

# Rentulækkingar

### *ECB hevur lækkað rentuna tríggjar ferðir*

Evropeiski miðbankin (ECB) hevur lækkað rentuna í juni, september og oktober 2024; hvørja ferð við 0,25 prosentstigum. Tvær tær fyrstu rentulækkingarnar hava longu fingið virknað í føroysku bankunum, meðan tann seinasta fær virknað frá síðst í november 2024 hjá einum av føroysku bankunum, og fyrst í desember 2024 hjá hinum trimum bankunum.

Rentan, sum føroysk húsarhald í miðal rinda fyri síni sethúsalán í føroysku bankunum, var 4,99% í september 2024, meðan miðalrentan á realkredittlánum hjá føroyingum var 3,72% í september 2024 íroknað bidrag, sí mynd 8.

Miðalrentan á realkredittlánunum er hækkað eitt vet í september 2024, hóast ECB hevur framt rentulækkingar. Hetta kemur av, at summi realkredittlán við stuttum rentubindingar-tíðarskeiði, til dømis F5 lán, eru endurfíggjaði. Tað merkir, at summi húsarhald, sum hava havt sera lága rentu meðan rentuhækkingarnar fóru fram í tíðarskeiðinum juli 2022 til juni 2024, nú eftir endurfíggingina hava fingið hægri rentu.

*Mynd 8. Bústaðarrentan lækkar*




Kelda: Landsbanki Føroya.

Rentulækkingar merkjast serliga hjá teimum, ið hava stóra skuld. Mong fáa tó rentustuðul, ið bøtir um rentuúreiðslurnar. Við eini bústaðarrentu á áleið 5% í løtuni, raka tey, sum

skylda meir enn 2 mió. kr. í bústaðaskuld, rentuloftið[2].

### *ECB fer at lækka rentuna aftur*

Væntandi lækkar ECB rentuna enn meira í komandi tíðum. Rentan er framvegis á einum støði, har hon táttar í búskaparliga, og sannlíkt er, at ECB ynskir at lækka rentuna, so hon hvørki táttar í ella er stimbrandi fyri búskapin. Ein renta, sum hvørki tálmar ella stimbrar búskapin, verður kallað tann neutrala rentan. Neutrala rentan er tó trupul at áseta, og hon kann broytast yvir tíð. Í løtuni verður neutrala rentan mett at vera 2%[3].

## Útlánskanning

### *Fíggjarstøðan batnar við rentulækkingunum*

Landsbankin biður í hvørjum ársfjórðingi í útlánskanning síni, føroysku bankarnir meta um millum annað broytingar í eftirspurningi eftir fígging, í krøvunum til kredittvirðið og í fíggjarstøðuni hjá kundunum.

*Mynd 9. Fíggjarstøðan batnar*

**Broyting í fíggjarstøðu, 2023Q2 - 2024Q3**

Útlánskanning, føroysku peningastovnarnir

Nettotal




Viðm.: Nettotalið verður roknað sum eitt miðal av svarunum hjá peningastovnunum. Peningastovnarnir svara í stigum frá -100 til 100. -100 merkir "táttað", -50 "táttað eitt sindur", 0 er "óbroytt", 50 "linkað eitt sindur", og 100 merkir "linkað". Kelda: Landsbanki Føroya.

Í triðja ársfjórðingi 2024 svaraðu bankarnir, at fíggjarstøðan (gjaldsevnið) hjá privat- og vinnukundunum er batnað í triðja ársfjórðingi orsakað av rentulækkingini, ið varð fráboðað í juni 2024 og fekk virknað í føroysku bankunum í juli 2024. Eftirfylgjandi kom ein rentulækking í september, sum bankarnir meta fer at betra um fíggjarstøðuna hjá privat- og vinnukundum í fjórða ársfjórðingi 2024, sí mynd 9.

Stabbarnir í myndini vísa, hvussu bankarnir meta støðuna vera í inniverandi ársfjórðingi (nýggjasta kanning er 3. ársfjórðingur 2024) og prikkarnir vísa, hvussu bankarnir meta støðuna fara at verða í komandi ársfjórðingi (tað vil siga í 4. ársfjórðingi 2024).

Tá ið bankarnir svaraðu hesari útlánskanning í september 2024, var triðja rentulækkingin hjá ECB enn ikki fráboðað. Triðja rentulækkingin fer somuleiðis at gera fíggjarstøðuna hjá kundunum í føroysku peningastovnunum betri í fjórða ársfjórðingi 2024.

### *Ikki broyting í eftirspurningi eftir fígging*

Hóast tvær rentulækkingar vóru fráboðaðar tá henda kanning var gjørd, sæst ikki stórvegis broyting í eftirspurninginum eftir fígging hjá verandi privat- og vinnukundum í føroysku bankunum. Bankarnir hava heldur ikki væntanir um, at eftirspurningurin eftir fígging fer at broytast í fjórða ársfjórðingi, sí mynd 10. Møguliga er eftirspurningurin frá vinnukundum eftir fígging ikki øktur hóast renturnar eru lækkaðar, tí fleiri verkætlanir júst eru lidnar og aðrar ikki byrjaðar enn.

*Mynd 10. Ikki størri eftirspurningur eftir fígging*

**Broyting í eftirspurningi eftir fígging, 2023Q2 - 2024Q3**

Útlánskanning, føroysku peningastovnarnir

Nettotal




Viðm.: Nettotalið verður roknað sum eitt miðal av svarunum hjá peningastovnunum. Peningastovnarnir svara í stigum frá -100 til 100. -100 merkir "táttað", -50 "táttað eitt sindur", 0 er "óbroytt", 50 "linkað eitt sindur", og 100 merkir "linkað". Kelda: Landsbanki Føroya.

Bankarnir boða hinvegin frá, at eftirspurningurin eftir fígging frá nýggjum privatkundum er øktur

[2] Rentustuðul á 35% verður latin av rentuútreiðslum á bústaðarskuld á í mesta lagið 100.000 kr. árliga.

[3] Nordea Markets Insights, DK “Nu sætter ECB renten ned igen”, podcast 11 oktober 2024.

eitt vet í triðja ársfjórðingi 2024, ið kann skyldast rentulækkingarnar (ikki víst í mynd 10).

# Inflatión

### *Rentan ávirkar brúkaraprístalið*

Rentulækkingin, sum varð boðað frá í juni 2024 og fekk virknað frá juli í føroysku bankunum, hevur togað vøksturin í brúkaraprístalinum niður í 3. ársfjórðingi 2024. Rentur er ein partur av nýtsluni hjá húsarhaldinum til býli og telist tí við í brúkaraprístalinum.

Vøksturin í brúkaraprístalinum var 1,7% í 3. ársfjórðingi 2024, ið er lægsti vøksturin síðani februar 2021, sí mynd 11.

*Mynd 11. Inflatiónin er minkað*

**Brúkaraprístalið, 1. ársfj. 2019 - 3. ársfj. 2024**
í mun til sama ársfjórðing árið fyri, %




Kelda: Hagstova Føroya.

Hinar báðar rentulækkingarnar, sum ECB boðaði frá í september og oktober 2024, fara væntandi at toga føroyska brúkaraprístalið niður í 4. ársfjórðingi 2024.

### *Er inflatiónin tálmað?*

Higartil er líkt til, at miðbankarnir í USA og Evropa hava megnað at tálma inflatiónina, uttan at ein búskaparlig afturgongd er í eygsjón.

Jesper Rangvid, professari á Copenhagen Business School og formaður fyri Rangvid-nevndini, ið kannaði orsøkirnar til fíggjarkreppuna í 2008[4], ger tó vart við, at inflatiónin í 1970-árunum á fyrsta sinni lækkaði, fyri síðani at hækka aftur.

Ein av orsøkunum til, at inflatiónin hækkaði enn einaferð í 1970'unum, var ov stimbrandi pengapolitikkur; rentan varð lækkað ov skjótt. Rangvid vísir tí á, at lækka miðbankarnir í USA og Evropa renturnar ov nógv og ov skjótt, kann tað birta uppundir inflatiónina einaferð afturat. Ov stimbrandi fíggjarpolitikkur kann somuleiðis birta uppundir eini veksandi inflatión, so sum skattalættar og veksandi almenn nýtsla og íløgur, sigur Rangvid[5].

Í løtuni tykjast miðbankarnar í USA og Evropa tó at hava hildið renturnar høgar nóg leingi til at kunnu tryggja sær, at inflatiónin veruliga er á veg niður. Hvørt miðbankarnir kortini hava lækkað rentuna ov tíðliga, fer tíðin at vísa.

# Fíggjarkreppur

### *Hvat eyðkennir fíggjarkreppur?*

Finn Østrup, professari á Copenhagen Business School hevur granskað danskar fíggjarkreppur aftur til 1300 talið[6]. Sambært Østrup gera hesi fýra viðurskifti seg galdandi í árunum undan eini fíggjarkreppu:

1. Høgur búskaparvøkstur
2. Stórar príshækkingar á ognum (sethúsum og virðisbrøvum)
3. Stórt bjartskygni (um t.d. veksandi sethúsaprísir)
4. Stórur vøkstur í skuld hjá húsarhaldum og fyritøkum.

Sambært Østrup hevur danski búskapurin seinastu 10 árini verið eyðkendur av trimum

---

[4] Rangvid rapporten, *Den finansielle krise i Danmark – årsager, konsekvenser og læring*, 2013.

[5] *Kudos to central banks*, Jesper Rangvid, "Rangvid's blog", oktober 2024.

[6] *Danske finanskriser fra 1311 til 2000*, Finn Østrup 2023. *Alt om kriser med Finn Østrup*, Podvarpið "Rig på viden", september 2024.

teimum fyrstu punktunum. Tað sama kann sigast um føroyska búskapin; hann hevur seinastu 10 árini verið eyðkendur av høgum búskaparvøkstri, stórum príshækkingum á sethúsamarknaðinum, og partvíst væntanir um veksandi sethúsaprísir (bjartskygni), sí eisini komandi brotið um vøkstur í sethúsaprísum.

Fjórða punktið; stórur skuldarvøkstur, eyðkennir ikki danska búskapin í løtuni, metir Østrup, tí donsku húsarhaldini eru als ikki eins skuldarbundin í dag, sum tey vóru undan kreppuna í 90'unum og í 2008. Heldur ikki føroysku húsarhaldini eru so skuldarbundin.

Flestu føroysku húsarhaldini hava í dag eitt lágt skuldarlutfall; einans 5% av føroysku húsarhaldunum, sum hava eina skuld omanfyri 2 mió. kr., skylda meira enn 3 ferðir teirra samlaðu árligu inntøku; tey eru um 950 í tali burturav umleið 19.300 húskjum (2023)[7].

## *Bústaðarbyrðan er økt*

Hinvegin er bústaðarbyrðan økt munandi síðani rentan byrjaði at hækka, heldur Finn Østrup; tað er nógv dýrari hjá húsarhaldum at seta búgv í dag, enn fyri bara nøkrum heilt fáum árum síðani, og tí er ov tíðliga at avvísa, at prísfall kunnu koma fyri á sethúsamarknaðinum, metir hann[8].

Í Føroyum er bústaðarbyrðan somuleiðis økt munandi seinastu árini. Tá ið bústaðarbyrðan byrjaði at veksa í umleið 2015, var rentan og inflatiónin enn lág, meðan inntøkurnar vuksu. Í árunum eftir 2022 er bústaðarbyrðan hinvegin økt vegna øktar rentuútreiðslur, sí mynd 12.

*Mynd 12. Bústaðarbyrðan er økt*




Kelda: Betri Banki. Bústaðarbyrðan er roknað fyri eitt par við tveimum børnum undir 7 ár, hvør persónur í parlagnum tjenar eina miðalløn, lánið er eitt annuitetslán á 25 ár, rentan er ein miðalrenta vektað eftir rentudøgum. Støddin á láninum svarar til miðalsethúsaprísin í økinum.

## *Rentuhækkingar kunnu elva til prísfall*

Sambært granskingini hjá Østrup, hevur bústaðarbyrðan havt stóran týdning í fyrrverandi kreppum. Í 90unum fullu sethúsaprísirnir í Danmark eftir at rentan varð hækkað. Í fíggjarkreppuni í 2008, var økta rentan eisini við til at trýsta prísirnar á sethúsamarknaðinum niður.

Í Føroyum fullu sethúsaprísirnir somuleiðis í 90unum og undir fíggjarkrepppuni í 2008, eftir at rentan varð økt fleiri ferðir á rað fram til hesar báðar kreppurnar, sí mynd 13.

*Mynd 13. Rentuhækking kann elva til prísfall*




Kelda: Betri Banki, sethúsaprísir alt landið (2024 er meting Landsbankans), 1. veðr. bústaðarrenta.

[7] Føroyskir peningastovnar krevja eitt skuldarlutfall undir 3,5, men kunnu loyva hægri skuldarlutføll um tað er í einum avmarkaðum tíðarskeiði. Hin 1. januar 2024 var ein dagføring av kunngerðini *"Bekendtgørelse for Færøerne om god skik for finansielle virksomheder"* sett í verk í Føroyum, ið inniheldur dagførdar ásetingar um eginfígging og skuldarlutfall. Kunngerðin hevur millum annað til endamáls at avmarka váðar, sum kunnu stinga seg upp á føroyska bústaðarmarknaðinum.

[8] Les eisini um øktu bústaðarbyrðuna í Føroyum í ársfrágreiðing Landsbankans um Fíggjarligt Støðufesti 2023.

Seinastu tvey árini hava tað eisini verið fleiri rentuhækkingar. Sum nú er, sær ikki út til at tað hevur givið fall í sethúsaprísinum, men tað sæst at vøksturin er minkaður.

Tað hava longu verið 3 rentulækkingar, og væntandi koma fleiri afturat. Tað fer at lækka um bústaðarbyrðuna hjá føroysku sethúsa-eigarunum.

Landsbanki Føroya *er ein óheftur almennur stovnur, ið virkar fyri fíggjarligum støðufesti, tað vil siga einum tryggum fíggjarkervi og einum høgum kredittvirði í Føroyum.*